# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.15**
**Í sendingini er samrøða við Jørgen Thygesen frá Berner, Jan Brixen frá KJ Hydraulik og við Vilhelm F. Jakobesen frá Tórshavnar Kommunu.**

# Berner-maðurin flytur til Damarkar

**Jørgen Thygesen, ið fyrstu ferð kom til Føroyar sum ferðandi sølumaður fyri Berner í 1982 og seinni búsettist her, flytur fyrst í komandi ári heim aftur til Danmarkar at búgva**

FLYTING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Jørgen Thygesen hevur sagt upp hjá Berner og flytur aftur til Danmarkar at búgva*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jørgen Thygesen, ella Berner-maðurin, sum hann eisini verður nevndur, byrjaði hjá Berner í Danmark sum sølumaður í 1980. Tvey ár seinni kom hann til Føroyar fyrstu ferð og vitjaði bil- og maskinverkstaðir kring landið. Hetta gjørdi hann tvær ferðir um árið fyrstu árini, til hann búsettist í Føroyum í 1992.

Tað sum hann selur mest av til bil- og masikverkstaðir eru brúksting sum t.d. skrúvur, skivur, borir, sagir og aðra útgerð umframt el- og hondamboð. Berner er ein altjóða fyritøka, sum varð stovnað í Künzelsau í Týsklandi av Albert Berner í 1957, og er framvegis ein familjufyritøka.

Í 1994 stovnar Jørgen Thygesen heilsøluna Sp/f DAFA, har hann umboðar ymiskar danskar fyritøkur við klædnavørum, stivlum og skóm. Hann hevur sostatt koyrt kring landið sum ferðandi sølumaður fyri bæði Berner og Dafa.

Eftir at hava búð fast í Føroyum í 17 ár, hevur Jørgen nú gjørt av at flyta aftur til Danmarkar at búgva. Tann 1. desember yvirtók Geir Wardum í Havn heilsøluna Dafa, og Jørgen hevur sagt upp hjá Berner til 1. januar eftir næstan 30 ár í starvi. Síðst í januar flyta hann og konan Oda, sum er føroysk, til Danmarkar at búgva. Tey hava keypt hús í Fredericia. Tey hava tó ikki slept Føroyum endaliga. Jørgen hevur enn umboð fyri onkrar skógvar og stivlar, sum hann framvegis kemur at selja her.

# Lykilin til trilliboruna - takk!

**Reinhaldið hjá Tórshavnar Kommunu hevur fingið eina tøkniliga framkomna eldrivna trilliboru, sum bæði kann bakka og vippa**

Nógv hevur seinastu tíðina verið gjørt burturúr elbilum. Herfyri royndarkoyrdu vit ein elbil hjá Lendisdeildini hjá Tórshavnar Kommunu, og nú hevur Reinhaldið hjá kommununi fingið eina eldrivna trilliboru.

Talan er um eina italska Zallys Dumper Jet við trimum hjólum, tveimum framman og einum aftan. Trilliboran er sum ein lítil dumpari. Hon er væl útgjørd og kann bæði bakka og vippa, eins og lykil skal til fyri at seta hana í gongd. Zallys verksmiðjan, sum KJ Hydraulik ið umboðar, gera annars nógv ymisk sløg av el-flutningstólum.

Vilhelm F. Jakobsen, sum dagliga koyrir trilliboruna, sigur, at hon er til stóra hjálp hjá honum til at rudda kring um í býnum. Nógvastaðni eru brekkur, og tað kann vera tungt at ganga við eini vanligari trilliboru við fullari last. Av tí at hendan er el-drivin, er hon sera løtt at arbeiða við og at handfara.

Dumper Jet, sum lastar upp til 400 kg, hevur ein 24V elmotor og koyrir við eini ferð upp á 5 km/t. Ein slík el-trillibora kostar umleið 30.000 krónur, alt eftir hvat útgerð hon hevur.

Jørmund Olsen, formaður í Reinhaldinum hjá kommununi, sigur, at hóast hendan Zallys Dumper Jet kostar umleiðr tríggjar ferðir so nógv sum ein vanlig arbeiðstrillibora, er hetta ein góð íløga. Hendan fyrsta, ið er keypt sum ein roynd, vísir seg at lætta væl um í dagliga arbeiðinum. Býurin er stórur og tað er langt um at fara.

**mg**




*Jan Brixen frá KJ-Hydraulik og Vilhelm F. Jakobsen frá Tórshavnar kommunu við eldrivnu trilliboruni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*